UTTAN ÚR HEIMI

## Steingja stórar bygningar

Myndugleikarnir í Pólandi hava gjørt av at steingja fleiri bygningar í og nærhendis býnum Chorzow, har ein syndarlig vanlukka seinasta leygardag kravdi 62 mannalív.

Vanlukkan hendi, tá takið á einari stórari framsýningarhøll datt oman yvir umleið 500 fólk, sum vóru komin saman í sambandi við eina brævdúgvuframsýning. Bjargingarliðið í Chorzow heldur, at takið hoyknaði undan tí nógva kavanum, sum lá á tí, og tí hava myndugleikarnir gjørt av at steingja fleiri slíkar stórar bygningar, inntil allur kavin er ruddaður burtur. Samstundis hava myndugleikarnir gjørt av at kanna, hvussu nógvan kava takið á slíkum bygningum tolir.

Onnur halda, at nógvir av teimum stóru byningunum í Pólandi eru als ikki egnaðir til tann nógva vetrarkuldan har. Í nítiárunum var byggivirksemið sera stórt í Pólandi, og fleiri av teimum stóru bygningunum eru gjørdir á sama hátt sum tilsvarandi bygningar í Bretlandi og Spania og tí als ikki bygdir til tann nógva kavan, sum kann koma niður í Pólandi um veturin, skrivar AP.

## Eiga at broyta fleiri dómar

Amnesty International heldur, at fleiri hundrað amerikanskir fangar, sum eru dømdir til deyða, eiga at fáa annan dóm, tí teir eru sálarliga sjúkir.

Felagsskapurin heldur, at umleið 10 prosent av teimum 3.400 amerikonsku fangunum, sum eru dømdir til deyða, eru sálarliga sjúkir, og at nógvir teirra hava heilaskaða. Felagsskapurin vil eisini vera við, at meiri enn 1.000 av teimum fangunum, sum eru avrættaðir í USA tey seinastu 30 árini, vóru sálarliga sjúkir. Mike Blackmore, sum er talsmaður hjá bretsku deildini hjá Amnesty International, sigur, at felagsskapurin er ímóti deyðarevsing yvirhøvur, men at tað er serliga atfinningarsamt, at sálarliga sjúk fólk verða dømd til deyða og avrættað.

Í amerikanska statinum Connecticut verða fólk ikki dømd til deyða, um tað kann prógvast, at tey vóru sálarliga sjúk, tá tey framdu brotsverkið, og í 1986 staðfesti amerikanski hægstirættur, at sálarliga sjúk fólk skulu ikki dømast til deyða.

## Tarvurin legði á áskoðararnar

Tey mongu túsund, sum vóru komin at hyggja at tarvadystum í Mexico Býi í gjár, fingu ein hvøkk, tá tað vísti seg, at ein av tarvunum sýtti fyri at halda seg til galdandi reglur.

Tarvurin, sum vigaði góð 500 kilo, var júst komin inn á vøllin. Brádliga snaraði hann sær á, leyp út um girðingina og upp á áskoðarapallin, har tann betri parturin av áskoðarunum sótu, skrivar AP. Ræðsluslignir áskoðarar royndu at koma sær burtur, og tey, sum ikki vóru nóg kvik, fingu sviðan av tí illa tarvinum at kenna. At enda eydnaðist tað einum manni at stinga tarvin so meint, at hann doyði. Løgreglan í Meksiko Býi sigur, at fleiri áskoðarar máttu flytast á sjúkrahús við ymsum løstum. Ringast var við einari kvinnu, sum hevði fingið annað hornið á tarvinum undir síðuna.

Tarvafiktingarvøllurin La Plaza México bleiv tikin í brúk fyri 60 árum síðani og hevur pláss fyri 48.000 áskoðarum. Sambært myndugleikunum er hetta fyrstu ferð, at ein tarvur hevur lopið á áskoðararnar.

# Grønlandsísurin bráðnar



*Tað nógva feskvatnið frá ísinum í Grønlandi kann fáa Golfstreymin at steðga*

**Bretsku myndugleikarnir bera ótta fyri, at vit hava ligið sjóvarfallið av okkum, soleiðis at nú er ov seint at avmarka vakstrarhúsárinið**

UMHVØRVI

*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

Vakstrarhúsárinið kann fáa nógv størri avleiðingar enn higartil hildið. Tað er niðurstøðan í einari kanning, sum bretska stjórnin hevur almannakunngjørt. Har stendur millum annað, at nú er helst ov seint at avmarka útlátið so nógv, at tað ikki ger skaða, og í ringasta føri kann tað hava við sær, at innlandsísurin í Grønlandi er burturi um túsund ár, og at vatnsstøðan í høvunum verður sjey metrar hægri enn í dag, skrivar BBC. Í fororðunum til frágreiðingina skrivar Tony Blair, forsætisráðharri, at avleiðingarnar av veðurlagsbroytingunum verða helst størri, enn vit hava hildið.

Norski havfrøðingurin Ola M. Johannessen, sum er leiðari á Nansenstovninum, sigur við Aftenposten, at hann er samdur við niðurstøðuni í bretsku frágreiðingini. Hann vísir á, at sambært kanningum hækkar grønlendski innlandsísurin seks centimetrar um árið í teimum økjunum, sum eru hægri enn 1500 metrar. Tað merkir, at ísmongdin veksur 70 rúmkilometrar árliga, men samstundis hava aðrar kanningar víst, at fram við strondini minkar ísmongdin 57 rúmkilometrar um árið.

Eftir hesum kanningunum økist grønlendski innlandsísurin 13 rúmkilometrar um árið, men Ola M. Johannessen vísir á, at nýggjar kanningar hava víst, ísurin minkar skjótari nú enn fyrr. Tað avgerandi er, hvussu lýtt tað er, sigur hann.

– Vit kunnu rokna við, at um túsund ár er eingin ísur eftir í Grønlandi. Tað fer at hava við sær, at heimshøvini hækka sjey metrar, og tað nógva feskvatnið frá tí bráðnaða ísinum at tálma ella kanska at steðga Golfstreyminum,. sigur Ola M. Johannessen.

Bráðnar grønlendski innlandsísurin, fer tað fyrst og fremst at raka tey fátæku londini. Í bretsku frágreiðingini stendur, at partar av vistskipanini fara fyri bakka, hungursneyðirnar verða fleiri, og trot verður á drekkivatni í menningarlondunum. Við Norðpólin fer ísbjørnin at doyggja út.

Amerikanska blaðið The New York Times skrivaði í síðstu viku, at Bush-umsitingin hevur roynt at forða einum av teimum fremstu amerikonsku veðurlagsserfrøðingunum at halda fyrilestur um avleiðingarnar av vakstrarhúsgassinum. James Hansen, sum arbeiðir hjá rúmdarumsitingini NASA, hevur leingi sóknast eftir einum politikki, sum skal avmarka útlátið í USA, men sambært The New York Times sleppur hann ikki at halda fyrilestur ella at skriva eina blaðgrein ella eitt teldubræv um evnið, fyrr enn stjórar hansara hava kannað innihaldið.

# Bush, Clinton, Bush, Clinton

**George W. Bush, forseti, kallar Bill Clinton „sín nýggja bróður“**

USA

*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

Hetta seinasta árið hava teir báðir fyrrverandi amerikonsku forsetarnir George Bush eldri og Bill Clinton skipað fyri fleiri tiltøkum til frama fyri neyðstødd. Eitt nú royndu teir av savna pening til tey neyðstøddu eftir flóðalduna í Asia, og í heyst gjørdu teir tað sama aftan á tær nógvu ódnirnar, sum herjaðu teir syðstu statirnar USA.

George W. Bush, forseti, dylur heldur ikki fyri, at í Bush-ættini verður Bill Clinton roknaður sum ein góður vinur.

– Teir báðir eru væl, og tað er stuttligt at síggja, segði forsetin í einari sjónvarpssamrøðu, har hann skemtandi umrøddi Clinton sum „sín nýggja bróður“. Hann segði, at tað eru royndirnar frá forsetatíðini, sum binda Bush eldra og Clinton so tætt hvør øðrum. Spurdur, hvat hann helt um, at kona Clinton, Hillary, kanska verður næsti forsetin í USA, svaraði forsetin skemtandi:

– Ja, men so verður tað Bush, Clinton, Bush, Clinton.